Dagf. 8. juni 2021
HMR J. nr. 21/09925-8

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-154/2020 eftir § 52a í tingskipanini um skipan við útlendskum serlæknum í sjúkrahúsverkinum, frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni

Spurningurin var soljóðandi:

1. Hvussu nógv serlæknastørv eru dekkað av læknum, sum búgva í Føroyum?
2. Er ætlanin at dekka fleiri serlæknastørv við læknum búsitandi í Føroyum?
3. Er møguleiki at tryggja eina serlæknaskipan, soleiðis at útskiftingin av útlendskum serlæknum er so lítil sum gjørligt?

Svar:

Til spurning 1

Umleið 40 serlæknastørv (ársverk) í Sjúkrahúsverkinum eru mannaði við serlæknum, sum hava bústað í Føroyum. Harumframt eru umleið 15 serlæknastørv (ársverk) dekkað við ymiskum konsulentum/konsulentskipanum.

Til spurning 2

Sjúkrahúsverkið arbeiðir áhaldandi við at fáa serlæknar við góðum førleikum til verkið, og tað er ynskiligt, at serlæknarnir eru búsitandi í Føroyum, tá ið teir verða settir í starv. Sambært Sjúkrahúsverkinum verður hetta mett sum ein fyrimunur fyri bæði sjúkling og lækna.

Tá ið Sjúkrahúsverkið hevur sett útlendskar læknar í størvini, (tað kann vera sum konsulentar í stafettum ella sum sonevnd "sentur til sentur avtala") er orsøkin, at tað ikki hevur borið til at fáa serlæknar búsitandi í Føroyum til tey serlæknaøkini. Á fleiri serlæknaøkjum eru tað ofta teir somu serlæknarnir, sum koma aftur, men á øðrum serøkjum eru serlæknarnir fleiri í tali. Sambært

Sjúkrahúsverkinum verður tað mett sum ein fyrimunur, tá ið tað eru teir somu læknarnir, sum koma til Føroya við jøvnum millumbilum.

Til spurning 3

Arbeitt verður støðugt við at tryggja eina serlæknaskipan, soleiðis at útskiftingin av útlendskum serlæknaum er so lítil sum gjørligt. Í fíggjarlógini fyri 2020 og 2021 er játtanin tilsamans hækkað við 6,4 mió. kr. til at seta fleiri serlæknar í starv. Harumframt er játtanin til at útbúgva yngri læknar sama tíðarskeið hækkað samanlagt við 3,9 mió. kr. Tað vil siga, at játtanin til hesi bæði økini er samanlagt hækkað við 10,3 mió. kr. hetta tíðarskeiðið.

Sum nevnt í svarinum til spurning 2 roynir Sjúkrahúsverkið mest møguligt at fáa sett serlæknar í starv, sum eru búsitandi í Føroyum fyri at tryggja eina serlæknaskipan við minst møguligari útskifting av útlendskum serlæknum.

Sum áður nevnt eru tey seinnu árini sett serstøk tiltøk í verk, sum hava til endamáls at seta fleiri serlæknar í starv umframt at útbúgva yngri læknar. Tað hevur eydnast Sjúkrahúsverkinum at seta fleiri nýggjar serlæknar í starv innan eina røð av sergreinum. Arbeiðið við hesi góðu gongdini fer at halda fram komandi árini. Samstundis hevur tað alstóran týdning fyri sjúkrahúsverkið, at læknar støðugt verða útbúnir.

Heilsumálaráðið, 8. juni 2021

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður